sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyrritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen -Jóstinus Eldesgaard - Sjúrður Skaale - Eyðun Klakksteín

Útgevari, uppseting og prent: P/F Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 28 Argjum

Postadr.: Postsmoga 78 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Spennandi avbjóðing

Oddagrein

KOMANDI tíð fer at vísa, hvussu nýggja stýrisskipanarlógin fer at virka í praksis. Henda skipan, sum nýliga varð samtykt, sleppur av álvara at standa sína roynd, tá figgjarlógaruppskotið kemur fyri á tingi.

HÓAST tað helst kann setast spurnartekin við mangt í nýggju stýrisskipanarlógini og verða víst á dømi, har hvørki politikarar ella skipanin sjálv eru búgvin til hesar mongu kollveltandi broytingar, so tykist tað mill-um manna at vera ein góður "stemningur", nú skipanin skal roynast og samgonga og andstøða skulu til at tosa meira saman og lurta meira eftir hvør øðrum.

VIT hava mangan víst á vansan í okkara politisku skipan, at ein samgonga hevur verið bundin á hond og fót av einum 17. manni. Hetta eru tað óteljandi dømi um. Og eisini hetta, at sitandi samgongur hava nærum vanvirt andstøðuflokkar og -politikkarar við ongantíð at taka teir upp á ráðella taka teir fyri fult. Tað sigur seg sjálvt, at slík skipan vil vera alt annað enn uppbyggjandi fyri okkara demokrati. Tí halda vit tað er spennandi at síggja, hvussu fer at gangast á tingi, tá samgongan hevur brúk fyri andstøðuni.

TAÐ er greitt, at nýggja skipanin setir stór krøv til politikararnar, men vit halda eisini, at hon ger tað nógv meira áhugavert at vera politikari, tí nú verður tú virdur uttan alla tíðina at skula verða oyramerktur eftir floksliti. Tað er greitt, at við hesi støðu kemur at liggja nógv størri ábyrgd á hvørjum einstøkum politikara. Ja krøvini til innlit, virðing, álit, sakligheit og ikki minst professionalismu verða stór. Latið okkum saman við forkvinnu javnaðarfloksins í blaðnum í dag seta okkara álit á, at nýggja skipanin fer at okkum øllum til frama.

Sosialurin

Lesarabrøv

Nøkur orð um Rithøvundafelag Føroya

Lógir felagsins eru frá stovningarfundinum 24. mars 1957. Tær eru framvegis í gildi, óbroyttar, burtursæð frá limagjaldinum.

Í 2. grein, um endamál felagsins, verður sagt: »Endamál felagsins er at savna føroyskar rithøvundar um felags áhugamál og at verja rættindi teirra eins og at virka fyri at føroyskar bókmentir fáa betri vakstrarvánir«.

Í 3. grein – um limir felagsins, stendur: »Rætt til at gerast limur í hesum felagi hevur hvør maður ella kvinna, ið skrivar bøkur á føroyskum, ella á annan hátt starvast sum rithøvundur. Er ivi um upptøkurætt, verður málið avgjørt av stjórn felagsins. Noktar stjórnin nøkrum upptøku, ella heldur hon, at limir eiga at fara úr felagnum, skal hon leggja málið fyri ársaðalfund ella eykaaðalfund, ið avger málið endaliga við vanligum meiriluta av greiddum atkvøðum«.

Mær skuldi verið óneyðugt at lagt aftrat, at innan hesar lógarkarmar hevur ein óg hvør limur somu skyldur – og nýtur somu rættindi.

Tórshavn, 8. des. 1995.

Heðin M. Klein,
formaður í
Rithøvundafelag Føroya

Eingin er samkyntur, men nøkur eru, ið lata seg (lokka at) brúka ímóti náttúruni!

Tann dagin Gud legði síðstu hond á Skapanarverk sítt, sætta dagin, lesa vit, at: *í bilæti Guds skapti Hann hana, sum mann og kvinnu skapti Hann tey. Og Gud signaði tey og segði við tey: nørist, vaksið í tali, fyllið jørðina...*

Og viðari lesa vit: *Og Gud sá alt tað, ið Hann hevði gjørt – og tað var sera gott!*

Har var, og har er, eingin tilvild hjá Gudi!

Har var eingin tilvild í ætlanum Guds sætta dagin. Og ikki er Hann broyttur tað minsta síðani tá! Sum mann og kvinnu (V.D.)/ kall og konu (J.D.) skapti Hann tey, og setti tey at nørast, vaksa í tali og at fylla jørðina. Og sum Hann skapti fyrstu menniskjuna, so skapar Hann í dag menniskju runt alla jørðina við somu ætlanum.

Og tá syndin kom inn og skapti skilna millum Gud og menniskjað, gjørdi Hann ein útveg, so at Hann aftur kundi gleðast yvir Skaparverk sítt, og siggja, *at alt tað Hann nú hevði gjørt (Frelsuverkið) var sera gott!*

Gjøgnum Frelsaran, einasta son sín, hevði Hann vunnið sigur á mótstøðumanninum. Ein sigur, sum tú og eg í gag kunnu lita á og liva av.

Aldrin aftur verður neyðugt hjá nøkrum skapningi Guds at trælka undir trælaoki djevulsins, undir øðrum og vanærandi umstøðum enn teimum, ið vóru ætlað at liva undir!

Hevur nú Gud sagt/
Orðaskifti við hin ónda

Uttan iva kennir hvør einasti føroyingur frásøgn Bibliunnar um hvussu satan á fyrsta sinni trein inn á pallin, ikki hart og brutalt, men listinlærdur, tá hann spurdi Evu: *hevur nú Gud sagt?*

Við yvirhøvur at fara í prát (orðaskifti) við satan, opnaði Eva fyri ti falli, sum hesin (satan) enn í dag ger sær dælt av.

Hvønn einasta skapning spyr hann dagliga hendan spurning, sum so væl ey dnaðist honum fyrstu ferð – *hevur nú Gud sagt?* Og í staðin fyri at gera sum Jesus gjørdi, seta honum stólin fyri hurðina *við at vísa á Orðið*, læna mong honum oyrað, tað oyrað, sum var skapað at njóta Guds vegleiðing og kærleiksfullu rødd.

Jamen, hevur Gud ikki skapað tey »samkyntu« – byrjar hann eitt av orðaskiftum sínum

Á jú, hvør einasti skapningur er úrslit av ófatuliga og stórsligna handaverki Guds okkara. **Men** einki av hesum undurverkum, sum hvørt einstakt menniskja er: er skapað sum samkynt, ella til eitt sovorðið lív – ikki ein!

Sum mann og kvinnu/ kall og konu, at liva saman, at nørast og fylla jørðina, skapti Hann teg og meg. Og til *sendiboð í stað Kristusar, til Ognarfólk at kunngera dygdir Hansara*, frelsir og loysir Hann okkum tann dagin vit, hvør einstakur, velja at fylgja Honum, og ikki tølandi lygnum mótstøðumansins, sum ikki er broyttur, men enn í dag nýtir somu hættir, sum móti Adam og Evu í fordum.

Nøkur eru, ið lata seg brúka...

Hvør einasti dagur er eitt val millum at liva eftir ti ætlan. Gud hevur við livi okkara, og teimum vanlukkuætlanum, sum satan hevur við livi okkara. Tú velur um tú vil geva eftir teimum lystum, tú veit eru skeivir, ella tú vil lata teg leiða av Anda Guds. Eingin noyðir teg at fremja kriminalitet ella at oyða lív títt í drukk – bert fyri at taka tvey onnur og tilvildarliga vald dømi. Á sama hátt noyðir eingin nakran at liva móti náttúruni (heitið Biblian nýtir um tað at liva sum sokallaður homosexuellur).

Nøkur eru, sum velja henda livsstílin, aloftast lokkað av monnum og kvinnum, sum kensluleys hava givið seg yvir til, at *»vanæra likam sini hvør við øðrum« (sum Biblian eisini nevnir tað!*

Reis teg, og far oman í hús leirkerasmiðsins!

Ein av vøkru frásøgnum Bibliunnar er at lesa í bók Jeramiasar, kap. 18, ørindi 1–4, har Gud tosar við Jeremias profet, og sigur:

... reis teg og far oman í hús leirkerasmiðsins! Har skal Eg lata teg hoyra Orð Mítt. Eg fór tá oman í hús leirkerasmiðsins, og hann tókst við klingrurnar. Og tá-ið ílatið, ið hann gjørdi, miseydnaðist – sum ganga kann við leirinum í hond leirkerasmiðsins – so gjørdi hann tað umaftur til annað ílat, sum hann nú vildi hava tað at era.

Hetta er aðalmálið í tilveru tinari og minari, at vit aftur og aftur hava brúk fyri *í* og eiga at fara *oman í hús leirkerasmiðsins – t.e. aftur til Gud og Skaparan*, og lata Hann, sum skapti teg og meg við sínum ávísa endamáli, taka okkum í kærleiksfulla favn sín, og endurskapa okkum, taka burtur alt tað skeiva, sum er komið inn í liv okkara, fyrigeva okkum, og við Kraft sínari gera okkum før fyri at liva júst tað lívið og tá ætlan, sum Hann frá upphavi hevði við okkum!

Hetta má hvør einstakur okkara gera – aftur og aftur. Tað er bjarging okkara at eiga hendan møguleikan, og hesin møguleikin stendur opin fyri tær og mær og hvørjum tí, sum lokkaður er inn á m.a. sokallaðar homosexuellar leiðir. Á tí leið deyðans nýtist eingin at vera, tí Jesus ynskir at møta tær har, umbroyta teg og gera teg til tænara sín.

Mong, sum lívdu sum homosexuell, liva í dag sum fulltíðar tænarar Harrans!

Runt um í heimi okkara finna vit í dag menniskju, sum áður lógu undir »homosexuellum lastum«. Men tey fóru »í hús leirkerasmiðsins« møttu Frelsaranum har, vórðu loyst, og tæna í dag Honum, í teirri ætlan, sum frá ævunum av var ætlað teimum.

Við teg, sum hevur latið teg lokkað og tølað av lygnum satans og manna, ynski eg at siga: *ger sum hin burturvilsti sonurin – statt upp og far aftur til Faðirin.* Tá fært tú at uppliva, at Hann biðar eftir tær, og ynskir at geva tær sonarrætt aftur heima hjá sær.

Og har er gott at vera!

Lat bert ikki listinlærd menniskju, sum sjálv eru lokkað av satan, villleiða teg. Lív títt er virðismikið í eygum Guds, og er ætlað til nakað hægri og betri.

Ein er, hvørs Faðireyga vakir yvir tær. Hann elskaði teg so høgt, at Hann gav Son Sín fyri teg (og meg). Og Hann hevur stórar ætlanir við tær og lívi tínum.

Tak eina avgerð beint nú tú lesur hetta, brót út úr trælahaldi djevulsins, bið Gud hjálpa tær – Hann biðar bert eftir bøn tinari.

Jenis av Rana